# LANDBÚNAÐARRÁÐGEVI



**Eitt starv sum landbúnaðarráðgevi á Búnaðarstovuni og Royndarstøðini, verður við hesum lýst leyst til setan eftir nærri avtalu.**

**Arbeiðsøkið hjá landbúnaðarráðgevanum verður at:**

- virka sum landbúnaðarfakligur ráðgevi innan fyrisitingarligu økini hjá Búnaðarstovuni og Royndarstøðini, harundir ráðgeva innan landbúnaðarfaklig viðurskifti í samskiftinum mótvegis avvarðandi aðalráði
- vera við til at kanna møguleikar fyri áhaldandi menning av úrtøku, dygd og virkni innan burðardygt djórahald og fóðurgerð
- taka sær av eftirlitsuppgávum innan stuðulsveitan til landbúnaðin
- taka sær av eftirlitsuppgávum viðvíkjandi festunum
- vera við til at taka sær av samskiftinum og møguligum samstarvi við út- lendskar stovnar innan sama øki.

Av tí, at stovnarnir eru lítlir, kann viðkomandi starvsfólk vænta eisini at skula taka lut í øðrum uppgávum á stovnunum eftir tørvi.

**Førleikakrøv**
Vit vænta, at umsøkjarar hava útbúgving innan landbúnað frá hægri lærustovni, t.d. búnaðarfrøðingur/agronom. Harumframt er tað ein fyrimunur um viðkomandi hevur royndir á økinum, og eisini er tað ein fyri-munur um viðkomandi hevur kunnleika til almenna fyrisiting.

**Vit kunnu bjóða**
Eitt spennandi starv, har tann, ið sett/ur verður, verður við til at byggja upp og framhaldandi menna fyrisitingarligu karmarnar innan føroyskan landbúnað.

**Løn og setanartreytir**
Starvið er normerað til 70% av fullari arbeiðstíð, og verður sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag. Møguleiki er fyri, at starvsøkið verður víðkað/broytt.

**Umsókn**
Send okkum eina umsókn við prógvum og viðmælum í seinasta lagi 7. juli 2008. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Umsóknir skulu sendast til:
*Búnaðarstovuna*
*Frammi í Dali 166*
*FO-410 Kollafjørður*

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Ara Johanneson, stjóra á Búnaðarstovuni ella Peder T. Haahr, stjóra á Royndarstøðini, á telefon 479000.

**BÚNAÐARSTOVAN**
Frammi í Dali 166 • 410 Kollafjørður
tlf. 47 90 00 • fax 47 90 20 • bst@bst.fo ▪ www.bst.fo

**Stutt lýsing av Búnaðarstovuni og Royndarstøðini**
Búnaðarstovan og Royndarstøðin eru stovnar undir Fiski- og tilfeingismálaráðnum, og fevnir starvsøkið sostatt um Fiski- og Tilfeingismálaráðið og stovnar undir tí.
Búnaðarstovan er skipað eftir løgtingslóg nr. 45 frá 15. mai 2007 um landsjørð, og fyrisitur alla almenna jørð, sum ikki er fyrisitin av ella skrásett sum ogn hjá øðrum almennum stovni.
Búnaðarstovan umsitur eisini árligu studningsjáttanina til landbúnaðarvinnuna, sum verður veitt við heimild í løgtingslóg nr. 32 frá 6. mars 2003.
Royndarstøðin skal m.a., við tíðarhóskandi jarðarbrúki fyri eyga, kanna møguleikar fyri at menna úrtøku, dygd og virkni í djórahaldi og í fóðurgerð. Høvuðsøkini eru m.a.:

- Djórahald og at geva fóður, uppi í hesum eisini seyðaráðgeving
- Vakstrarvelting
- Jarðarbrúkstøkniligar kanningar og royndir
- Tænastuveiting til landbúnað og myndugleikar, uppi í hesum ísáðing, neytaeftirlit, jarðar- og eftirútbúgvingarvirksemi
- Varðveita føroysk húsdjórasløg
- Ráðgeving fyri at byrgja fyri, at landbúnaður og landbúnaðarvinna dálka

4,5 heiltíðarstørv eru á Búnaðarstovuni og 5 heiltíðarstørv umframt tveir lærlingar eru á Royndarstøðini.

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
Setursskrivstovan · tlf. 35 25 00
J. C. Svabos gøta 14 · Postrúm 272
110 Tórshavn · www.setur.fo

# Adjunktur í løgfrøði

## Starv á Fróðskaparsetri Føroya

ENDURLÝSING

Á Søgu- og samfelagsdeildini á Fróðskaparsetrinum er eitt nýtt adjunktstarv í løgfrøði leyst at søkja.

**Starvsøki**
Umframt at taka sær av undirvísing í grundskeiði í lóg skal adjunkturin saman við lektara fyrireika og leggja til rættis eina komandi masterútbúgving í lóg og fremja gransking í lóg. Adjunktstarvið er eitt útbúgvingarstarv sett fyri 4 ár, soleiðis at adjunkturin eftir 4 árum vinnur sær neyðugan granskingar- og undirvísingarførleika fyri at kunna setast í fast starv sum lektari.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarin skal hava kandidatútbúgving ella samsvarandi í løgfrøði og hava áhuga fyri gransking og fara undir eina Ph.D. verkætlan í løgfrøði.

Løgfrøðingar við drúgvum løgfrøðiligum royndum í verki kunnu, uttan at kravt verður, at teir fara undir Ph.D. útbúgving, eisini søkja starvið, men teir skulu vinna sær førleika á annan hátt og lektarametast eftir 4 árum fyri at koma í fast starv.

Adjunkturin skal duga at samskifta væl á føroyskum, enskum og norðurlendskum og skal hava førleika til at knýta netverk og samstarva við onnur universitet.

Til at meta um umsóknirnar verður sett ein sakkøn metingarnevnd mannað við trimum fólkum. Av hesum skal eitt fólk hava góðan kunnleika til løgfrøði í Føroyum.

**Umsóknir**
við ævilýsing, avritum av próvskjølum, viðmælum ella tilvísingum, møguligum vísindaligum greinum og ritgerðum í trimum eintøkum skulu vera Fróðskaparsetrinum í hendi áðrenn 10. juli 2008.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til deildarleiðaran, Elin Súsonnu Jacobsen, tlf. 352583, elinsj@setur.fo, til setursskrivaran, Rúnu Hjelm, tlf. 552504 runah@setur.fo ella til rektaran Jóan Paula Joensen, tlf. 552503, jopajo@setur.fo.

**Umsóknir skulu sendast til:**

Fróðskaparsetur Føroya
J.C. Svabos gøtu 14 – Postrúm 272 – FO-110 Tórshavn

Visti tú ikki tað? Sosialurin

Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!